FØROYA HANDILSSKÚLI
TEKNISKI SKÚLIN
Team 85 • 316511

## Handfaring av oljusáttmálum
### í samband við verkætlanararbeiði

Í samstarv við Handilsháskúlan BI í Stavanger skipar Skeiðsdepilin við Marknagil fyri skeiði í handfaring av sáttmálum í samband við oljuvinnuna.

**Skeiðinnihald:**
- verkætlan og sáttmálar
- sáttmálastýring og innkeyp
- keypsmannagongdir
- lýsingar av ymiskum sløgum av sáttmálum
- handfaring av váða í sáttmálum
- tekniskt grundarlag/fyrisitingarlig krøv
- teknisk bílegging
- arbeiðslýsing
- sáttmálakrøv
- samsýning

**Málbólkur:**
Verkfrøðingar, búskaparfrøðingar og onnur, ið skulu fara undir leiðarauppgávur í torgreiddum verkætlanum.

**Tíðarskeið:** 11; 12; 13; og 14. februar 2002
**Skeiðleiðari:** Terje I. Vålans, Center for Organisatorisk Læring, Handelshøjskolen, Stavanger
**Kostnaður:** Kr. 2.000,- fyri hvønn, íroknað er frálæra, tilfar og mat.
**Tilmelding:** Áðrenn 1. februar 2002

Nærri fæst at vita við at venda sær til

**SKEIÐSDEPILIN VIÐ MARKNAGIL * SDM**
Marknagilsvegur 77 • Postrúm 177 • 110 Tórshavn • Tel 31 88 13 • Fax 31 33 74,
T-postur: fh-sth@post.olivant.fo • Heimasíða http://sth.olivant.fo

**Viðvíkjandi P/F 1532, P/F Georg Kjærbo í likvidatión, 270 Nólsoy**

Vísandi til § 72 í " Lov om Aktieselskaber" frá 15. apríl 1930, skal Skráseting Føroya við hesum, heita á nevndina/likvidator í omanfyri nevnda felag, um innan 3 mánaðar frá í dag at upplýsa um felagið enn er til. Um Skrásetingin einki hevur frætt tá henda freist er farin, verður felagið strikað úr Skrásetingini.

Skráseting Føroya 24. januar 2002

Kristin Balle

**Viðvíkjandi P/F 1335, P/F Ulo í likvidatión, 270 Nólsoy**

Vísandi til § 72 í " Lov om Aktieselskaber" frá 15. apríl 1930, skal Skráseting Føroya við hesum, heita á nevndina/likvidator í omanfyri nevnda felag, um innan 3 mánaðar frá í dag at upplýsa um felagið enn er til. Um Skrásetingin einki hevur frætt tá henda freist er farin, verður felagið strikað úr Skrásetingini.

Skráseting Føroya 24. januar 2002

Kristin Balle

## TB skipar fyri NÓSA-CUP

**"NÓSI" og TB skipa fyri innandurakapping í Ítróttarhøllini í Trongisvági 16. februar 2002**

| Aldursbólkar: | |
|---|---|
| · Pinkur | 1992-1993 |
| · Gentur 10-12 ár | 1990-1991 |
| · Smágentur 12-14 ár | 1988-1989 |
| · Pinkulingar | 1994-1995 |
| · Smápiltar | 1992-1993 |
| · Piltar | 1990-1991 |
| · Smádreingir | 1988-1989 |
| · Dreingir | 1986-1987 |

**Aldursbólkarnir** *pinkulingar, smápiltar, piltar, smádreingir, pinkur, gentur 10-12 ár og smágentur 12-14 ár*

***leika við 4 útileikarum og málmanni + eykaleikara***

Aldursbólkurin *dreingir* hevur 4 leikarar + eykaleikara

**Liðini skulu hava nøvn eftir kendum fótbóltsliðum**
*(t.d. Man. Utd. - Liverpool - Leeds - Arsenal - Barcelona - osv - osv -)*

*Luttøkugjaldið er 200 kr. fyri hvørt liðið*

*Tilmelding:*
*Seinasta freist at melda seg til kappingina er 02/02-2002*
*Tlf. 372 539 ella 220 314*

NÓSA TB 1892

Veitst tú ikki tað?

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Umlættingarfamiljur

Barnaverndarnevndin í Tórshavnar kommunu søkir eftir umlættingarfamiljum.

Ein familja er umlættingarfamilja, tá hendan átekur sær at hava barn/børn búgvandi í t.d. vikuskiftum ella ávíst dagatal í senn, alt eftir hvat avtalað verður. Hetta fyri at umlætta familjuna og barnið við.

**Sum umlættingarfamilja fáa tit:**
- spennandi og mennandi arbeiði, sum tíðum kann verða kravmikið
- tætt samstarv við sosialu deild
- samsýning

**Vit vænta av eini umlættingarfamilju:**
- at hon er vælvirkandi
- at hon hevur stundir til børn
- at hon hevur gevandi samband við børn
- at hon samstarvar við familjuna hjá barninum, sosialu deild og aðrar samstarvspartar.

Eru tit áhugaði og vilja vita meira, kunnu tit venda tykkum til sosialu deild hjá Tórshavnar kommunu, tlf. 315160 og spyrja eftir Onnu Mariu Troest. Umsóknirnar skulu stílast til barnaverndarnevndina hjá Tórshavnar kommunu, boks 32, 110 Tórshavn.

SNARSKIVAN

**Vit hava nú aftur fingið nakrar flugufangarar á goymslu**

**Flugufangarnir eru sera effektivur og verða brúktir bæði privat og á virkjum, fjósum o.a.**

| | | |
|---|---|---|
| ALTI 2100 til rúm støddir uml. 50-80 m² | prísur einans | kr. 1.895,- |
| ALTI 2138 til miðal stór rúm uml. 100-150 m² | prísur einans | kr. 2.095,- |
| ALTI 2214 til rúm støddir uml. 200 m² | prísur einans | kr. 2.995,- |

**SPF. ALTING** tlf. 210 298 fax 318 591
Vit senda um alt landið

## VHF telefonin
til skip og bátar



post ordrar verða avgreiddir

Nú einans
kr. 2.975,-

**Storno** Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045

Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Vikuskifti

Nr. 18 • leygardagur • 26. januar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Dagbóksbrot úr eini hospitalssong



Lesið á síðu 4 og 5



*Í februar mánaði kemur fløga hjá Creamy út í Onglandi, og tá verða øll segl sett fyri, at hálvføroyska poppduoin kann fáa gjøgnumbrot á hesum risastóra marknaði*

# Creamy bíðar eftir útlandinum

Í februar mánaði kemur fløga hjá Creamy út í Onglandi, og tá verða øll segl sett fyri, at hálvføroyska poppduoin kann fáa gjøgnumbrot á hesum risastóra marknaði

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Tær taka tað róligt í løtuni, Rannvá og Rebecca.

Ongar konsertir eru á skránni í januar mánaði, men tá tað líður út í februar mánað, fer nakað at henda.

Tá fer Creamy at gera eitt stórt átak á bretska tónleikamarknaðinum, har fløgan hjá teimum, We Got The Time, kemur út. Ein stakfløga skal royna at slóða fyri einum gjøgnumbroti á hesum risastóra marknaði, og tær báðar genturnar skulu gera vart við útgávuna við eini PR-ferð til London miðskeiðis í næsta mánaði.

- Tær fáa alla tíðina tilboð um at verða við í ymiskum tiltøkum, men tær taka ikki av øllum. Tær vilja passa skúlan hjá sær, og tí taka tær ikki ov nógvar uppgávur á seg, sigurAnni Joensen, sum er mamma Rannvá.

Men hóast tað er friðarligt í løtuni, so skalt nógv leggjast fyri, tá Creamy-genturnar fara til Onglands at promovera nýggju fløguna hjá sær um ein slakan mánað.

### Jólasølan ikki tann sama

Fyri jól hevði Creamy úr at gera, tí tá royndu tær at gera vart við nýggju jólafløguna hjá sær. Tær framførdu ymsastaðni og signeraðu fløguna nógvastaðni. Jólafløgan hjá teimum seldi ikki so nógv, sum aðrar fløgur hjá teimum hava gjørt, men fløgusølan sum heild var stak vánalig í fjør.

Donsku plátufeløgini stúra nú veruliga fyri, at nógv ólógliga kopieringin av tónleiki rakar marknaðin ógvusliga. Stór afturgongd er í søluni hjá flest øllum bólkum, og undan jólum vóru Creamy tann bólkurin, sum seldi flest jólafløgur, hóast 25.000 eintøk er lítið aftur ímóti tí, sum tær áður hava selt av sínum útgávum.

Men í løtuni er tað ikki heimligi marknaðurin, sum plátufelagið hjá teimum hugsar mest um. Tvær ferðir til Onglands í november og desember mánaði í fjør vóru lovandi. Stórur áhugi var fyri føroysku Rannvu og donsku Rebeccu, og bæði fjølmiðlar og altjóða deildin hjá EMI halda seg síggja møguligar stjørnur í teimum báðum gentunum.

- Vit kunnu sjálvsagt ikki fáa nøkur lyfti um, at tær fara at klára seg væl í Onglandi, men plátufelagið heldur, at tær hava møguleikan fyri at fáa eitt veruligt gjøgnumbrot á bretska marknaðinum, sigur Anni Joensen.

### Gera vart við seg í London

Tað verður sangurin, sum punkfriseraði Limahl gjørdi kendan í áttati árunum, sum skal slóða fyri einum gjøgnumbroti í Onglandi. Sangurin Neverending Story verður givin út sum stakfløga 17. februar, og higartil hevur áhugin fyri júst hesum sangi verið stórur á ávísum sjónvarps- og útvarpsstøðum í Onglandi.

Fløgan, sum Creamy skal geva út í Onglandi, er tann sama, sum tær góvu út í Danmark fyri einum ári síðani. Hendan fløgan er meira tannáringa poppur enn barnatónleikur, og fløgan verður mett at hava eginleikarnar, sum skal til fyri at vinna fram uttan fyri Danmark.

Áðrenn stakfløgan verður latin sølubúðunum fara Rannvá og Rebecca at gera vart við seg í Onglandi. Tær skulu verða fýra dagar í London, og har skulu tær hitta ensku pressuna. Tær skulu gera samrøður, vitja útvarpsstøðir og framføra í sjónvarpi.

- Hvussu framtíðin hjá Creamy verður veldst nú alt um, hvussu tað fer at ganga í útlandinum. Um tað ikki ber til at fáa eitt gjøgnumbrot í Onglandi, so er stóri spurningurin, hvat bólkurin síðani fer at takast við, sigur Anni Joensen, mamma Rannvá.

Um Neverending Story og hinir sangirnir á fløguni fella væl í oyruni á ungdóminum á bretska meginlandinum, so verður søgan um Rannvá og Rebeccu kanska ein ævintýrsøga uttan enda.